DAGSINS MEINING

Fiskivinnan og treytir

Fyrr í vikuni var eitt kjak í Sjónvarpi Føroya um trupulleikan við, at so nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum. Tað er gott at Sjónvarpið tekur aktuell mál sum hetta upp til kjak, tí loftmiðlarnir hava við sínari stóru gjøgnumslagskraft ein sera týdningarmiklan leiklut í tí almenna kjakinum.

Luttakarnir í kjakinum bóru fram sjónarmið umboðandi ráfiskaseljarnar og ráfiskakeyparnar. Haruftarat komu formaðurin í Búskaparráðnum og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eisini við sínum sjónarmiðum.

Ráfiskaseljarnir í Føroyum vísa seg at hava tað traditionella sjónarmiðið um, at teir hava veitt fiskin, og tí eiga teir at sleppa at selja, har teir fáa best prís, sama hvar tað er. Hetta sjónarmiðið var forsvarligt í teimum døgum, har ein og hvør kundi útgera skip og fara til fiskiskap. Nú er tað bara ikki so. Tað er ikki ein og hvør, ið fær fiskiloyvi. Tey reiðarí, ið hava fiskiloyvi í dag, hava fingið tað fyri einki frá landinum. Ein og hvør kann ikki keypa nýtt skip og fara at fiska, men noyðist at gjalda privatum fyri at fáa lut í verandi loyvum. Tí er ikki talan um ein fría vinnu, men um eina sterkt reguleraða vinnu. Fyriuttan at fáa tað frammihjárættindi fyri einki, ið eitt fiskiloyvi er, so verða reiðaríini stuðlað við einum skattlætta og einari minstulønarskipan, ið tekur um endan, um tað gongur illa. Ráfiskaseljarnir argumentera, sum um teir vóru í fríari kapping uttan subsidiering. Tað eru teir ikki, og tí er tað púra beint, sum Meinhard Jacobsen stjóri í Føroya Fiskavirking sigur, at treytir eiga at fylgja við. Tað líkist snøgt sagt ongum, um løtuvinningstráan og manglandi samfelagssinni skal verða orsøk til, at skip liggja og selja fisk niðri í Hanstholm, í summum førum til undirprís enntá.

Tað er eisini rætt, tá stjórin á Fiskavirking sigur, at man ikki má leypa framav, tá man alment skal gera reglar fyri keyp og sølu av føroyskt veiddum ráfiski. Vit kenna tað frá øðrum vinnum, at vørur skulu tvørturum føroyskan keikant. Hví ikki krevja, at allur fiskur veiddur við føroyskum fiskiloyvi skal um føroyskan keikant? Endamálið má vera, at føroysk virkir fáa møguleikan at bjóða uppá fiskin, uttan man nýtist at gera reglar fyri, hvør vøra verður útflutt ella ikki. Sjálvandi eru nógvir ivaspurningar, men ikki nýtist loysnin at vera, at krevja fiskin á eina einstaka uppboðssølu. Hví ikki bara krevja keikantin? Hetta ger, at føroysk virki við støð í Føroyum fáa fyrimun, óansað um útlendingar bjóða uppá fiskin.

Sjónarmiðið um, at eingin regulering skal verða á sølu á ráfiski heldur ikki, tí fiskivinnan á sjógvi er ræðisavmarkað, og tí eiga treytir at fylgja við almenna frammihjárættinum, ið tað er at fáa eitt fiskiloyvi fram um onnur fyri einki við skattafyrimuni og minstulønarskipan afturat. Tíverri vísir tað seg, at um treytir ikki fylgja við, so verður tað løtuvinningurin hjá einstaka skipinum, ið avger, hvar fiskurin verður avreiddur. Men skilligt eru tað fleiri meiningar um hetta, og tær meiningarnar eiga so sanniliga eisini at verða hoyrdar og viðgjørdar í tí almenna kjakinum um hetta so týðandi málið.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Latið okkum skapa virðing um fosturtøkuspurningin

- men sjálvsagt er tað kvinnan sjálv, sum tekur avgerðina

Finnur Helmsdal

Um tað er Bill Justinussen, landsstýrismaður, sum skýtur og Jenis av Rana, løgtingsmaður og kommunulækni sum løðir, ella um leiklutabýtið teirra millum er blandað øðrvísi, hevur ikki so stóran týdning. Tað, sum hevur týdning er, at tað umboðini fyri Miðflokkin hava sagt seinastu tíðina um fosturtøkur og tey, sum fremja slíkar, ikki á nakran hátt hevur skapt virðing fyri hvørki kvinnuni ella sjálvum fosturtøkuspurninginum. Tíverri hevur tað, sum onnur seinastu tíðina hava sagt um somu viðurskifti, heldur ikki gagnað stórvegis. Forkvinnur og landsstýriskvinnur úttala seg og vísa til tøl og støðuna á arbeiðsmarknaðinum, sum er fosurtøka bara okkurt ein kann nýta til at fremja aðrar sakir við. Ongin, ikki ein, sum hevur verið frammi seinastu tíðina og úttalað seg um fosturtøku, hevur roynt at leggja orðaskiftið upp á tað støðið, sum spurningurin um fosturtøku hevur uppiborið. Eingin hevur roynt at lýsa sjálva avgerðina um at lata ein lækna taka fostrið, sum eina djúpt persónliga avgerð, ið er fongd við, ofta sníkjandi, sálarligum trega og avleiðingum annars. Avgerðin um at fremja fosturtøku kann vera lætt at taka, og lívið kann eisini ganga viðari, sum einki var hent, eftir at tøkan er framd. Men soleiðis er tíbetur ikki altíð. Sum oftast er alt ein sálarligur hurlivasi hjá teimum, sum hugsa um at lata sítt fostur taka. Og sum oftast verður avgerðin tikin, tí aktuella støðan hjá viðkomandi talaði fyri tøku. Avgerðin varð langt frá altíð tikin, tí viðkomandi inniliga ynskti fosturtøku, men heldur tí viðkomandi ikki dugdi at síggja ella hugsa nóg klárt júst ta løtna. Avgerðin varð oftast tikin, tí viðkomandi hvørki fekk ráðgeving ella stuðul, tá harðast stóð á.

Spurningurin um fosturtøku er og verður persónligur, er og verður ein spurningur um nógv innilig og álvarslig viðurskifti. Spurningurin um fosturtøku er ikki ein avlaða, fundamentalistisk og demagogisk tulking av skriftini. Fosturtøka kann heldur ikki rættvísgerast við tilvildarligari tilvísing til tøl, sum eingin veruliga kennir. Fosturtøka skal heldur ikki nýtast sum jarnbrot fyri at vinna kvinnuni javnrættindi á arbeiðsmarknaðinum. Sjálvandi skal kvinnan hava javnrættindi, men hetta má og kann vinnast á aðrar mátar.

Bill skal fremja tingsins vilja

Í viðtalu við Útvarpið í samband við fosturtøkuspurningin segði Bill Justinussen, at hann ikki bert er landsstýrismaður fyri Miðflokkin, hann er landsstýrismaður fyri samgonguna. Bill er meira enn so, hann er landsstýrismaður fyri allar Føroyar. Føroya fólk hevur valt løgtingið, og tí má og skal Bill fremja tingsins vilja. Føroya løgting hevur sagt sína hugsan í hesum máli. Hetta tá Jenis av Rana og tríggir aðrir tingmenn í valskeiðnum undan hesum løgdu fram uppskot um at broyta og herða lógarásetingar um møguleikar og mannagongdir í samband við fosturtøku. Málið endaði í trivnaðarnevndini, og fekk tað har eina neyva, og eftir mínum tykki, rættiliga kvalifiseraða viðgerð. Nevndin mælti tinginum til ikki at taka undir við uppskotinum, men heitti síðan á landsstýriskvinnuna um, skjótast gjørligt, at seta á stovn nakað sum minti nógv um "mødrehjælpen". Hetta fyri at tryggja kvinnum, sum koma illa fyri vegna graviditet, stuðul og ráðgeving, soleiðis at hon verður betur før fyri at taka avgerðina. Tað er umráðandi, at kvinnan ikki kennir seg einsamalla undir slíkum umstøðum, tað er eisini umráðandi, at onkur hjálpir kvinnuni at síggja heildarmyndina, kanska í tíðarperspektivi eisini. Sjálvandi kann stuðul, ráðgeving og leiðbeining frá Guds fólki eisini vera viðkomandi í hesum sambandi. Men tað er langt frá viðkomandi, at landsstýrismenn standa og hótta og vilja lóggeva í mun til tulkingar av skriftini. Jenis av Rana atkvøddi ikki móti sínum egna uppskoti, men tað gjørdi onkur uppskotsstillari saman við so at siga restini av tinginum. Tilmæli um ein mødrehjælp varð væl fagnað, men tíverri gjørdi táverandi landsstýriskvinna einki við málið. Og hevur eingin landsstýrismaður síðan heldur nomið tað við einum fingri. Jenisi dámdi sjálvur stak væl tankan um eina mødrehjælp, og segði hann eina ferð seinni, at hann kundi hugsað sær at sett uppskotið fram av nýggjum, tá skiftandi landsstýrismenn ikki góvu tí ans.

Tí fari eg at enda hetta skriv við at mæla Bill Justinussen, landsstýrismanni til at fremja vilja tingsins. Og eg fari at mæla honum til at gera tað, um hann veruliga vil skapa virðing um fosturtøkuspurningin og tær kvinnur, sum verða raktar í hesum sambandi.

Avgerðina um fosturtøku fer kvinnan altíð sjálv at eiga.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfar. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Arctic Viking

Jóhan Joensen

Hevði ikki ætlað mær í nakað blaðkjak, men tá viðmerkingarnar hjá Grækaris sáa iva, hvørt undirritaði sigur sannleikan, føli eg meg noyddan at koma við enn eini viðmerking.

Meir hóskandi hevði verið at lagt kjakið á tað støði, har tað hoyrir heima, og viðgjørt kjarnuna í málinum - hví søkir eitt reiðarí um útflagging, og hvussu er støðan hjá rækjuflotanum, men sum eg

skilji, hevur hetta ikki áhuga. Tú ynskir heldur at fara í smálutir, og leggur meg undir, bert at siga hálvan sannleikan, og tað vil eg ikki hava sitandi á mær.

Hóast undirritaði í forhond er dømdur at tapa í kjaki við drivnar og gølusøkjandi tíðindamenn, ditti eg mær kortini at "skera tað í smálutir":

Johnsigurd Johannessen ringdi til mín seinnapartin hósdagin 25. september at fáa eina samrøðu til Dag og Viku sama kvøldið. Skotbráðið var stutt, og undirritaði bar seg undan. Johnsigurd bað meg umhugsa hetta til dagin eftir.

Fríggjamorgunin 26. september ringdi undirritaði til Johnsigurd og játtaði at gera eina samrøðu um málið sum heild, men at hetta kundi ikki gerast fyrr enn mánadagin, tí eg, eins og nógv av bygdarfólkinum, var lagstur við krími og febri. (Vilt tú, Grækaris, hava prógv fyri, at eg var sjúkur, er tú vælkomin at ringja til mín.)

Avtalað bleiv, at Johnsigurd skuldi ringja aftur mánadaguin, so vit kundu avtala eina tíð.

Týsdagin og gjøgnum vikuna er tað so John Johannessen, ið vil hava meg at gera viðmerkingar til vinningsbýtið. Eg segði honum, at eg dagin fyri hevði játtað at koma í sjónvarpið at viðgera støðuna, men fekk ikki boð aftur, og eg fór ikki bert at gera viðmerkingar til vinningsbýti. Hann spurdi, hvønn eg hevði tosað við, og um eg nú var fornermaður. ***(Tað undrar meg ikki sørt, at hann ikki visti, hvønn eg hevði tosað við, tí sum tú sigur, verður hetta viðgjørt á einum samlaðum redaktiónsfundi)***

Nei, tað liggur mær ógvuliga fjart at ganga fornermaður. So mikið havi eg hóast alt lært mína tíð í vinnulívinum, at tað kemur tú ikki langt við.

Hóskvøldið 9. oktober var "Breddin" á skránni. Hetta var eftir mínum tykki partvís ein hampuliga góð sending, har vit fingu nakað av innliti í, hvussu okkara lógarsmíð fer fram. Eisini høvdu tit ein skilagóðan og sakligan grannskoðara, Jógvan Sundstein, at viðgera okkara roknskapir, vinningsbýti og framtíðarvánir.

Eg var ikki sørt spentur og hevði satt at siga væntað, at John Johannessen fór at enda sendingina við at ynskja okkum góða eydnu við hesi royndini at varðveita skipið. Men nei, hann spældi plátuna umaftur, at vit takkaðu nei at selja skipið og býta 16 mio. millum eigararnar, eftir at hvør hevði fingið sítt, eisini landskassin: ***Landsbúskaparligur hugsunarháttur fyri víðarikomin á høgum støði má sigast.***

Tað var í lagi, at sendingin vísti, hvørji skip høvdu fingið umlagt veðhald til rentu- og avdráttarfrí lán, men sendingin hevði eftir mínum tykki eina stóra slagsíðu. Onki kom fram um veruligu støðuna hjá flotanum, og hvønn týdning hann hevur fyri samfelagið. Nei, sendingin botnaði í at finna nakrar persónligar syndarar.

Eg kann skoyta uppí, at um Arctic Viking fær loyvi at flagga til Litava, tilføra vit samfelagnum partar av virðum, ið eru tillutaði øðrum landi, samstundis sum rúmsáttari er hjá øðrum føroyskum skipum at fiska føroyskar kvotur. Hevði í míni fávitsku líkasum vænta okkum eitt herðaklapp frá John fyri tað.

Tú sigur, at uppgávan hjá tykkum journalistum er at vera fólksins varðhundur, og alt gott um tað.

Eg hevði nú eisini mett, at partur av tykkara uppgávu er at bera sakligan og positivt gevandi tíðindaflutning, men her fari eg kanska skeivur.

Eftir stendur ósvikaliga fast:

SVF-tíðindadeildin hevur ikki við einum orði viðgjørt kjarnuna í málinum.

SVF-tíðindadeildin hevur sum einasti fjølmiðil ikki við einum orði viðgjørt veruligu støðuna hjá rækjuflotanum, og hvønn týdning hann hevur fyri samfelagið.

Hetta hóast sera gott høvi, nú figgjarlógin hevur verið til viðgerðar, samstundis sum Zakaris Hammer, sum altíð, við síni mergjaðu og gevandi sending lýsir søguna hjá rækjuvinnuni og teir undangongumenn, ið fyri hava slóðað og verið við til at lagt lunnar undir velferðarsamfelagið Føroyar.

Telduskipan til kommunulæknar

– svar til havnarkonu

D. Petur Højgaard
kommunulækni

Takk fyri bræv títt í Dimmu 14. okt. Tú setur fram týðandi spurningar um viðurskiftini hjá sjúklinginum í einari framtíðar EDV-læknaskipan.

Verður hann eitt nú at "sveima" á netinum í eini samskiftandi telduskipan til øll við atgongd til skipanina at hyggja at? Hvat við upplýsingum latnum í trúnaði? Tagnarskylduni? Hvussu trygg er slík skipan aðrar vegir? Hvør eigur og kann geva loyvi til nýtslu av data? Læknar? Aðrir myndugleikar? Sjúklingurin ?

FELAGSSERVARIN

Av tí, at tú nevnir felagsservarin sum eitt møguligt vandamál, skal eg royna at svara spurningum tínum.

Havi verið við at menna íslendsku SAGA- skipanina til føroysk viðurskifti. Hendan skipanin byggir á nevnda felagsservara og er annars gjørd sum ein heildarloysn, tvs er ætlað at fevna um heilsuverkið alt kommunulæknar, heilsusystrar, heimasjúkrasystrar, ljósmøður, sjúkrahúsini, apotek, almannastovu, sjúkrakassar.

Loyvi mær at nevna fyrst, at skipanin hevur verið roynd í kommunulæknahøpi og riggar væl. Harumframt og ikki minni týdningarmikið lúkar hon tær treytir, tú sum sjúklingur í brævi tínum setur til slíka skipan.

Skipanin er bygd upp soleiðis, at teir ymsu brúkararnir hava atgongd til ymsar partar av skipanini.

Ímillum hesar partar eru elektroniskar forðingar, skott, um tú vilt. Tí ber eitt nú ikki til hjá teimum á apotekinum at síggja anna enn tað, sum viðvíkur teirra arbeiði. Somuleiðis hava ymsir læknar teirra "kassar" at arbeiða í. Tað, tú t.d. hevur í trúnaði við kommunulækna tín, síggja onnur ikki. Heldur ikki aðrir læknar. Hetta svarar til, at onnur ikki hava atgongd til tína bankakonto í EDV-skráini hjá peningastovnunum.

SAMSKIFTI

Tú kanst samskifta í SAGA-skipanini, tvs senda informatión. Eitt nú receptir, ávísingar, læknaváttanir ber til at senda elektroniskt. Til ber somuleiðis at taka ímóti elektroniskum posti. Skipanin syrgir fyri, at ymisk data fara rættan veg og ikki aðrastaðni.

Samskiftið hevur avgerandi týdning fyri slíka skipan. SAGA-skipanin er ment til at samskifta á tryggan hátt, nevnliga á intranetinum hjá Heilsuverkinum.

Tá talan er um trygd, er vert at nevna, at skipanin í samskiftinum ímillum viðtalurnar og servaran eisini er tryggjað forsvarliga. Somuleiðis, at í viðtalunum eru ongi data at stjala har er bert útgerðin til sjálvt samskiftið. Og at øll data eru savnað á einum stað á servaranum, sum stendur í serligum rúmi, vardur ímóti fysiskum og øðrum ágangi.

Tað er rímiligt at meta, at ein skipan við nógvum smáum eindum, eitt nú tíggjutals smærri servarum er verri at tryggja, verri at verja og viðlíkahalda. At ein slík loysn, um trygdin skal vera á leið, gerst dýrari. Tær dansku skipanir, ið eru ínýtslu í Føroyum í dag, hava tann vansa, at tær samskifta ikki og lúka ikki krøvini hjá dataeftirlitinum um trygd. Tað ger SAGA-skipanin.

Seinast í brævi tínum spyrt tú, um tað kann bjarga mannalívum, at journalin er til sjals fyri øll viðgerðarstøð í føroyum.

Hetta er, sum greitt er frá omanfyri, ikki hugsanin. Men í SAGA-skipanini er møguleiki fyri at geva ávísa informatión viðari. Dømi: sjúklingur, ið ikki tolir penicillin og tí kann koma í lívsvanda, fær hann henda heilivág. Tað er gott, at sjúklingurin og lækni hansara vita um hesi viðurskifti.

Uppaftur hentari hevði tað verið, um eisini aðrir læknar og kanska apotekið við vistu um trupuleikan. Ella at skipanin sjálv automatiskt segði frá, um roynt var at skriva út penicillin til nevnda sjúkling. Onnur dømi eru eisini.

Passandi kundu slíkar informatiónir verið "givnar viðari" í samráð ímillum sjúkling og kommunulækna hansara.

SJÚKLINGURIN EIGUR DATA

Tað er skyldan hjá teimum, sum í heilsuverkinum hava við viðkvæmar EDVupplýsingar at gera at fara væl um. Men principielt átti tað at verið tú, ið sum sjúklingu hevur ræði á "tínum" EDV-tilfari í einari elektroniskari læknaskipan. At tað er er tú, sum evt. í samráð við lækna tín ert hann, sum gevur loyvi til skilagóða nýtslu av tí EDV-tilfari, ið viðvíkur tær.

At tað við øðrum orðum ert tú, sum avger, í hvønn mun tú sveimar á netinum.

Ein servara, eina journal?

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!